GJALDSTOVAN

# Sáttmáli um tænastustig (SLA) av Landsnet fakservarum millum stovn, hereftir xxx og KT Landsins, hereftir KTL

## Avtala

Henda avtalan er gjørd millum STOVN og KTL. Avtalan er ein ískoytisavtala til høvuðsavtaluna, 'Sáttmáli um tænastustig av Landsnet grundtænastum', millum STOVN og KTL. Hetta merkir, at høvuðsavtalan hevur gildið í hesum viðurskiftum:

- Kap. 1.2 Samskiftispersónar
- Kap. 2.2 Trygd (KTL viðurskifti)
- Kap. 2.3 Tíðarskeið og atgeingi
- Kap. 2.4 Support
- Kap. 2.6 Ábyrgd og skyldur hjá stovninum
- Kap. 3.4 Trygd (Stovnsviðurskifti)
- Kap. 6 Endurskoðan av SLA
- Kap. 7 Fráboðan
- Kap. 8 Force majeure
- Kap. 9 Uppathald og mishald

Í øðrum viðurskiftum hava ásetingarnar niðanfyri gildi.

## Yvirskipað lýsing av veitingum

Veitingarnar sum henda avtala umfatar, eru infrastrukturtænastur av fakservarum á Landsneti. Tekning og talva niðanfyri lýsa nærri hvørjar hesar tænastur eru.




| Landsnettænastur | Leigan av virt.serv. | Leigan av fys.serv. | Fys. Serv.* |
|---|---|---|---|
| Hýsing | X | X | X |
| Storage | X | X | (X) |
| Backup | X | X | (X) |
| Virtualiseringsware | X | X | |
| Stýrisskipan | X | (X) | |
| Patch mngmt | X | (X) | (X) |
| Yvirvaking | X | (X) | (X) |
| DB Admin | | | |
| Applikatións Admin | | | |

** Ogn hjá stovninum*

## Uttanhýsis veitari

Hevur uttanhýsis veitari hjá stovninum tørv á atgongd til skipanina, skal veitarin uppfylla trygdarkrøvini, sum KTL setir veitarum.

## Backup og restore

Tað verður tikið backup av skipanini og málið við hesum er:

- At kunna endurskapa dátur
- At stovnurin í ringasta føri ikki missir dátur meira enn ein dag

Tað hevur týdning at kunna endurskapa eina støðu, sum liggur i fortíðini, tí skal vera avtalað, hvørja backup-loysn, KTL skal veita í hesum sambandi. Víst verður til skjalið "Backup profilar" sum liggur á Landsnetsíðuni á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni[2]

KTL mælir til at Backup verður tikið av øllum servarum.

Tað er ábyrgdin hjá stovninum at kunna KTL um viðurskifti í sambandi við backup. KTL tryggjar, at tað, sum stovnurin ynskir backup av, kemur á band.

Í sambandi við restore er tað uppgávan hjá stovninum at sanna, at dáturnar kunnu lesast, og at endurskapta skipanin virkar, sum hon skal.

KTL ger restore stakroyndir av backup av servarum í Landsneti.

Um stovnurin ynskir restore ella data recovery[1] av ávísum data/skipan/servara, so skal tað tilskilast í hesi avtalu. Stovnurin rindar fyri hetta.

Í skjalinum "Servaratilmæli", sum liggur á Landsnetsíðuni á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni[2], er eitt yvirlit yvir, nær KTL mælir til restore og recovery.

## Tilbúgving

Stovnurin hevur ábyrgdina av at hava eina tilbúgvingarætlan/neyðætlan fyri sítt virksemi, sum hesar tænastur stuðla undir.

## Web-loysnir

Vendir skipanin móti opna alnetinum, skal skipanin verða tryggjað við teimum trygdarloysnum, sum KTL hevur, og skal fylgja hesum forskriftum, t.d. penetrationtest í sambandi við broytingar.

---

[1] Restore er innlesing av fílu frá backup á disk. Recovery er fullfíggjað endurskapan av servara og/ella skipan.
[2] https://gjaldstovan.fo/Gjaldstovan/taenastur/radgeving-um-sattmalar-og-avtalur/

KTL bíleggur og letur árliga gera penetrationtestir av IP adressum fyri DMZ servarar. Stovnurin rindar fyri hetta.

Stovnurin hevur skyldu til at fyrihalda seg til teir veikleikar, sum penetrationtestin vísir og fáa loyst tilmælini. Fyri at skipanin skal verða góðkend (compliant), skulu miðal og hægri raðfest tilmælini verða loyst. Stovnurin rindar fyri hetta.

## Dagføringar og útgávur

KTL krevur, at infrastrukturforrit (t.d. Windows) verða dagførd fyri fakskipanir, tá talan er um trygdarspurningar, t.d. menning av infrastrukturinum ella fyri at halda ein skynsaman rakstur av infrastrukturinum.

KTL tilskilar sær rætt, við einum 1 ára skotbrái, at de-supportera eldri útgávur av stýrisskipanum. Hetta merkir, at KTL einans supporterar stýrisskipanum, har framleiðarnir enn veitur support.

## Lisensir

KTL kann krevja at infrastrukturlisensir verða dagførdir fyri fakskipanir, tá talan er um trygdarspurningar, ella tá hetta forðar fyri at menna infrastrukturin.

Stovnurin ábyrgdast fyri teimum lisensum, sum knýta seg til fakskipanina. Í sambandi við raksturin er neyðugt at stovnurin tilskilar, hvussu lisensirnir eru knýttir til fakskipanina, hetta er serliga umráðandi, um skipanin er avmarkað til eitt ávíst tal av CPU/kjarnum.

Tað er týdningarmikið, at raksturin er tryggur og lógligur, tí ger KTL árliga eina compliancerapport. Henda rapport umfatar tó einans Microsoft skipanir. Stovnurin fær atgongd til tær upplýsingar úr rapportini, sum viðvíkja teirra stovni.

Talvan niðanfyri vísir hvørjir lisensir eru íroknaðir servaragjaldinum.

| Lisensir | Fysiskur servari | Virtuellur servari |
|---|---|---|
| Styrisskipan | | X |
| Virtualisering | | X |
| Antivirus | X | X |
| Yvirvaking | X | X |
| Backup | X | X |

Stovnurin hevur møguleika at keypa Micorsoft lisensir til servararnar upp á avtaluna, sum KTL hevur við Microsoft.

## Test

Hevur stovnurin tørv á einari testinstallatión av síni skipan, ber hetta til, men hendan kemur at liggja á einari testinstallatión á Landsneti, sum ikki lýkur somu trygdarkrøv og tænastustig sum produktiónsinstallatiónin. T.d. verður trygdaravrit ikki tikið av testinstallatiónini og yvirveking verður ikki gjørd av servarunum. Stovnurin hevur ábyrgdina av testdata, t.d. at sletta og anonymisera.

## Broytingar til Tænastur & veitingar.

Fylgiskjal 1, 'Tænastur og veitingar' vísir støðumynd yvir hvørjar servarar og veitingar avtala er gjørd um, tá henda avtala var undirskrivað. Umbønir um nýggjar servarar ella broytingar á verandi servarum, sum koma eftir at henda avtala er undirskrivað, verða skrásettar í Help Desk skipanina hjá Landsnet, og skjalfesting í Help Desk skipanini verður sostatt løgfrøðiliga bindandi.

## Samskiftið

Brúkararáðið fyri Landsnet viðgerð yvirskipaðar avgerðir viðvíkjandi hesari avtalu. Avtalan verður viðgjørd á fundum hjá Brúkararáðnum.

Samskiftið millum KTL og stovn um tænastur og tænastustig ásett í hesari avtalu fer fram á fundum millum STOVN og KTL. Fundir verða hildnir eftir tørvi og bæði STOVNUR og KTL kunnu taka stig til fund.

## Grannskoðan

Stovnurin ábyrgist fyri grannskoðan av fakskipanum, og KTL grannskoðar fakservarainfrastrukturin. Ynskir stovnurin, at tað verða tikið serlig atlit í grannskoðanini, so skal hetta vera tilskilað í fylgiskjali 1, "Tænastur & veitingar"

## Kostnaður

Servarar á Landsneti skulu gjalda smb. príslistanum hjá KTL.

Avrokning fer fram mánaðarliga. Stovnurin ábyrgdast fyri at eftirkanna, at avrokningin er røtt.

| Fyri STOVNIN | Fyri Gjaldstovuna, KTL |
|---|---|
| ____________________ Dagf. ________ | ____________________ Dagf. ________ |